# ENN EITT **SKRÆDL** SKAKAÐI SAMFELAGIÐ

Í 1951 FÓR **SJÓVINNUBANKIN** AV KNÓRANUM, TÍ HANN LEGÐI **OV NÓGV FYRI** AT FÍGGJA **FISKISKIPAFLOTAN**. Í 1992 OG 1993 FÓRU **SJÓVINNUBANKIN** OG **FØROYA BANKI** UM KOLL, TÍ ALT **SAMFELAGIÐ** HEVÐI FLOTTAÐ SÆR Í EINUM **PLANBÚSKAPARLIGUM** RÚSI. **KREPPAN** TÁ LÆRDI **MYNDUGLEIKAR**, VINNU OG PRIVATFÓLK, AT **ANSNI** RØKKUR LONGST, MEN EFTIR ÁR **2000** FÓR **ÚTRÁSARHUGUR** AT GERA UM SEG, M.A. Í **EIK BANKA**, OG EISINI TAÐ KOSTAÐI **SAMFELAGNUM** EIN INSOLVENTAN **BANKA**



**BANKAKREPPUR**

Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Mánamorgunin 27. september 2010 fer í søguna sum dagurin, tá øllum gjørdist greitt, at fekk Eik Banki ikki nýggjan kapital, fór hann á húsagang. Tey, sum eru eldri enn 30, hugsaðu hendan morgunin straks um 6. oktober 1992. Hendan svarta týsdagin á heysti fyri 18 árum síðan vórðu føroyska bankakervið og samfelagið sett undir umsiting. Svøvntungir føroyskir politikarar, ið vóru kallaðir til Keypmannahavnar vikuskiftið frammanundan at fáa kunning um ringu støðuna hjá Sjóvinnubankanum, kunngjørdu, at teir høvdu havt eitt val millum pest og kolera. Annaðhvørt lænti landið pening at seta í Sjóvinnubankan og gekk undir eyðmýkjandi politiskar treytir úr Danmark, ella fór Sjóvinnubankin á húsagang, og samfelagsskaðin gjørdist óbótaligur.

So álvarslig var støðan ikki mánamorgunin. Føroyska samfelagið er nógv betur fyri í dag enn í 1992, og fáur danskur politikari hevði dittað sær at sett tummilskrúvurnar á politisku skipanina í Føroyum, tá hugsað verður um ta flóðaldu av órættarkenslu, sum reisti seg í Føroyum í sambandi við partabrævaumbýtið í Føroya Banka í 1993. Ta ferðina avhendaði Den Danske Bank landsstýrinum síni partabrøv í einum falleraðum banka, og stutt eftir máttu føroyskir politikarar biddaragongd til Danmarkar eftir góðari milliard at seta í bankan. Hetta var flestu føroyingum ovboðið, krav varð sett fram um dómarakanning, og endin gjørdist ein serfrøðingakanning, sum staðfesti, at føroyingar høvdu verið fyri órætti. Seinni mátti danska stjórnin so lata landsstýrinum endurgjald.

Hvussu hýrurin var í Eik Banka mánamorgunin, er ikki ilt at ímynda sær. Tá skelkandi tíðindi berast, kemur ótti á fólk, og ráðaloysi valdar. Tørvurin á at tosa er stórur, og summi gera kanska gjøldur burtur úr støðuni, tó at hon er álvarslig. Tann 6. oktober í 1992 var støðan eisini álvarslig í høvuðssætinum hjá Sjóvinnubankanum í Húsagøtu í Havn. Á borðunum stóðu blómur og karamellur, tí Sjóvinnubankin sama dag fylti 60 ár. Fólk vóru uppsnollað og tóku blídliga ímóti tíðindafólkunum, ið vóru komin at forvitnast um, hvat var á vási. Inni í fundarhølinum sótu stjórarnir troyttir og greiddu frá støðuni. Hølið var fult av fólki, serliga tíðindafólkum. Tey lósu m.a. burtur úr avtaluni, sum føroysku politikararnir høvdu skrivað undir við donsku stjórnina, og vóru samd um, at landið var sett undir umsiting.

## Aftur óvitandi

Ein tann størsti stríðsspurningurin eftir bankabjargingina 6. oktober í 1992 gjørdist stutta skotbráið, sum føroysku politikararnir fingu at umráða seg í, og vantandi vitanin, teir høvdu havt um støðuna hjá Sjóvinnubankanum. Danska fíggjareftirlitið hevði ikki nakra fráboðanarskyldu mótvegis føroyskum myndugleikum, bara donskum, og tí kundu danskir politikarar taka føroyskar myndugleikar á bóli og seta teimum treytir afturfyri at bjarga Sjóvinnubankanum. Seinni kom fram, at danskir myndugleikar sínámillum høvdu umrøtt, at føroyingar tilvitað skuldu takast á bóli, so politiska skipanin fekst at skilja, hvussu vánalig støðan í Føroyum var. Ikki minst hetta fekk føroyingar at ilskast og krevja at fáa málið kannað.

Tá tað snýr seg um vantandi kunning og snarboð tvørtur um eitt vikuskifti, minnir støðan í dag nógv um støðuna tá. So seint sum í august mánaði kunngjørdi Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður við fíggjarmálum, at Eik Banki fór ikki at koma í trupulleikar. Hetta hevði hann fingið at vita á fundi í Keypmannahavn. Ein góðan mánað seinni veit Fíggjareftirlitið fullvæl, at Eik Banki er insolventur, boðar danska búskaparmálaráðharranum frá støðuni, sum so sendir boðini til Føroya. Enn einaferð uppliva føroyskir politikarar at fáa revolvaran fyri pannuna í einum bankamáli. Bankin er á veg á heysin, siga danskir myndugleikar, avleiðingarnar kunnu gerast vanlukkuligar fyri alt samfelagið, og um landskassin ikki pungar út í ein vissan fart, ja, so má hann liva við avleiðingunum.

## Teir stóru falnir

Við hóttandi húsaganginum hjá Eik kann staðfestast, at allir teir stóru bankarnir í Føroyum nú onkuntíð hava verið insolventir. Tað fyrsta stóra bankaskrædlið upplivdu føroyingar í 1951, tá Sjóvinnubankin á fyrsta sinni fór á húsagang. Tær góðu tíðirnar eftir seinna heimsbardaga høvdu havt við sær, at nógvur kapitalur var savnaður í Føroyum, men flotin var niðurslitin, og skip vóru eisini horvin av krígsávum. Sjóvinnubankin gjørdist drívmegin í arbeiðinum at endurnýggja flotan, og trolararnir, ið keyptir vórðu, vórðu